# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Bókanýtt

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

## Stórverk eftir Gunnar Hoydal

*Gunnar Hoydal*
*Í havsins hjarta*
*skaldsøga*
*Sprotin*
*517 blaðsíður*
*Kemur 18. oktober*




Stutt undan næstseinasta aldaskifti kemur nýlærdur prestur, 24 ára gamal, til landið, beint sum ein nýggj og øðrvísi tíð tekur seg upp. Presturin er langabbi høvundans. Haðani tekur søgan um Føroyar í tjúgundi øld seg upp.

*Í havsins hjarta* er skaldsøga um tíðina frá jólafundinum gjøgnum tjóðskaparrørslu, heimsbardaga, fólkaatkvøðu, NATO, kalda kríggið og stóra skrædliðframtilfólkafundin á Sléttaratindi nakrar fáar mánaðir fyri nýggja aldaskiftið. Ein søga um vónir og vónbrot í hundrað ár, sæð við eygunum á einum, sum er heima og burturi í senn, eygleiðari, droymari og samstundis luttakari.

Gunnar Hoydal skrivar tekstir við støðu í egnum royndum, ólíkar og títt skiftandi millum heilaspuna og veruleika, minningarbrot og frían skaldskap, her sett saman í 39 partar til eina breiða skaldsøgu um heimin, landið og tíðina.

Skaldsøgan *Í havsins hjarta* eftir Gunnar Hoydal kemur í handlarnar 18. oktober.

## Tóroddur við nýggjum savni

*Tóroddur Poulsen*
*ROT*
*Yrkingar*
*Mentunargrunnur*
*Studentafelagsins*
*126 blaðsíður*
*190 kr.*
*Er útkomið*




Nýggja savnið eftir Tórodd Poulsen víkur eitt sindur frá høvuðsrákinum í undanfarnum søvnum. Tað er ein modernistiskur dámur yvir mongum av tekstunum, sum í poetiskum myndum smýgur seg inn og úr medvitinum og ger óvanlig sambond. Spurningur verður settur við alt, men frásøgufólkið er samstundis á varðhaldi, at børnini ikki fara at gera tað sama. Tey skulu liva, sum vit siga og ikki, sum vit gera. Viðhvørt koma ræðandi óhugnaligar myndir fyri, myndir, ið seta livikorini í relieff.

Speisemi er kortini minni enn so burtur. Sagt verður, at syndin kann ikki vísast burtur, fyrr enn hon er roynd, og yrkjarin vónar, at fanin hittir ein annan eingil. Tí so kann hesin frelsa hann og taka hann upp aftur í himmiríki, hóast lívið á fold ikki verður so stuttligt longur.

Myndir eftir høvundan eru í savninum, og einastaðni stendur við hondskrift: So stutt síðani vit komu í verðina at spyrja um hví?

Eitt hugkveikjandi og skemtiligt savn av yrkingum eftir ein av Føroya fremstu høvundum.

## Heimsbókmentir á føroyskum

*Halldór Laxness*
*Undir egið borð*
*Skaldsøga*
*Týtt hava Tóra Tórodds-dóttir og Martin Næs*
*Sprotin*
*436 blaðsíður*




*Undir egið borð* eftir Halldór Laxness er stórverkið, ið fór sum skógareldur um allan bókmentaheimin, og sum høvundurin fekk nobelheiðurslønina fyri.

*Undir egið borð*, sum á upprunamálinum eitur Sjálfstætt fólk, er ein av best umtóktu skaldsøgunum hjá Halldóri Laxness. Hon er týdd til nógv mál og er komin út víða um í heiminum, m.a. er seld í fleiri hundrað túsund eintøkum í USA. Hon elvdi til hart stjórnmálakjak í Íslandi, tá ið hon kom út í 1934-5, og í dag er hon ein tann størsti mentanardýrgripurin, ið íslendingar eiga. Kanska ein tann størsta skaldsøgan, ið nakrantíð er komin út í Norðurlondum.

Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs, hava sitið og totast við at týða bókina í eini 4-5 ár. Úrslitið er fantastiska fínur føroyskur tekstur, sum innihaldsliga skarar so fram um aðrar bøkur, at eingin, ið hevur lisið hana, er rættiliga tann sami aftaná.

Bókin er á gáttini, men útkomudagurin er ikki ásettur enn.

Spennandi og avbjóðandi starv sum

Marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways

Atlantic Airways skal hava nýggjan marknaðarleiðara.

Leiðarin hevur ábyrgdina av allari marknaðarføring og sølu hjá felagnum og skal í samstarvi við stjórn felagsins menna eina marknaðar- og sølustrategi, ið skal tryggja at felagið framhaldandi mennist. Marknaðarleiðarin verður partur av leiðslubólkinum og skal saman við hesum vera við at tryggja kappingarføri felagsins.

Marknaðarleiðarin hevur ta strategisku menningina av deildini um hendi, skal leggja ætlanir fyri átøk, implementera verkætlanir, røkja samskifti við viðskiftafólk, røkja og menna samskiftið við samstarvsfelagar heima og uttanlands.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur innlit og royndir innan vinnugreinina, altjóða royndir, og hevur útbúgving innan marknaðarføring og sølu.

Viðkomandi skal hava góð evni at samskifta, bæði í skrift og talu, hava góð evni at skapa og viðlíkahalda netverk, umframt duga at síggja góðar inntøkumøguleikar.

Talan er um eitt krevjandi men spennandi, avbjóðandi og mennandi starv. Neyðugt er at hava hug og umstøður til lutfalsliga nógva ferðing uttanlands.
Lønin verður ásett eftir avtalu.

Um fleiri upplýsingar ynskjast, kanst tú venda sær til Magna Arge, stjóra, tel 341000, magni@atlantic.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. oktober 2007, og skal sendast til:

Atlantic Airways
Starvsfólkadeildin
FO-380 Sørvágur

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, hvørs virkismentan er eyðkend av, at fokus altíð er á trygd, stundvísi, kundan og úrslitið. Umleið 200 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, sum hevur heimstað í Sørvági. Árligi umsetningurin í 2006 var 519 milliónir krónur.
Atlantic Airways hevur fimm flogfør og tríggjar tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Harumframt er virksemi víðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo